**Álitisfólkaskipan hjá Musikklærarafelag Føroya**

**§1:** Til álitisfólk og varaálitisfólk kunnu veljast limir í Musikklærarafelag Føroya, sum hava lógarkravda útbúgving og minst ½ starv.

Álitisfólk skal hava arbeitt í økinum sum hann/hon er vald í minsta lagi 1 ár, áðrenn viðkomandi kann veljast til álitisfólk, uttan so at tað av serligum umstøðum gerst neyðugt at víkja frá hesum.

Álitisfólk og varaálitisfólk verða vald í hesum økjum:

- Suðuroy, Sandoy og Tórshavn
- Vágar, Norðurstreymoy, Sunda kommuna
- Eysturoy, Norðoyggjar

*Stk. 2:* Nevndin skipar fyri vali av álitisfólkum og varaálitisfólkum, í teimum ymsu økjunum á 2. hvørjum ári fyri 1. oktober. Valúrslitið skal staðfestast á ársaðalfundi felagsins."

**§ 2:** Musikklærarafelag Føroya kunnar álitisfólkini um lógir, sáttmálar og aðrar avtalur. Álitisfólkið eigur at ansað eftir at lógir, sáttmálar og aðrar avtalur verða hildnar. Álitisfólkið, ið er talsmaður limanna, hevur saman við musikkskúlasstjóranum og kommunala musikkskúlaleiðaranum ábyrgd av, at limirnir verða kunnaðir og tiknir við í ráðum um mál, ið viðvíkja arbeiðsplássinum.

Álitisfólkið skal, eins og musikkskúlastjórin og kommunalu musikkskúlaleiðararnir, syrgja fyri best møguligum samstarvi og góðum arbeiðsviðurskiftum. Álitisfólkið hevur tagnarskyldu.

**§ 3:** Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at leggja áheitanir og klagur frá limunum fyri musikkskúlastjóran og kommuala musikkskúlaleiðaran. Álitisfólkið skal vera ráðgevandi fyri musikkskúlastóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar. Musikklærarafelag Føroya og limir tess um arbeiðsviðurskifti, rættindi og skyldur.

Álitisfólkið hevur skyldu til at kunna limirnar í økinum og Musikklærarafelag Føroya um øll viðkomandi viðurskifti.

**§ 4:** Tá ið musikklærari verður sagdur úr starvi ella fær boð um at flyta skúla, kann álitisfólkið leggja málið fyri Musikklærarafelag Føroya.

**§ 5:** Verður álitisfólk uppsagt, skal uppsøgnin viðgerast millum Musikklærarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Við uppsøgnini skal fylgja holl skrivlig grundgeving fyri uppsøgnina. Hendan grundgeving verður grundarlagið undir fundinum millum Musikklærarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**§ 6:** Tá ið álitisfólk og starvsfólk søkja um at sleppa á álitisfólkaskeið, fer arbeiðsgevarin at viðgera slíkar umsóknir við vælvild. Sama er galdandi fyri nevndarlimir í felagnum.

*Í Tinganesi tann 6. februar 2019*

Musikklærarafelag Føroya

Fíggjarmálaráðið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið